# Á leikvøllum funnust í forðum

BÓKAUMMÆLI
*Jóan Pauli Joensen*



Viðhvørt hendir tað, at tú kemur at hugsa um, hvussu tað hevði verið, um tað ikki varð vorðið, sum tað er. Hvussu hevði bygdin Sørvágur t.d. sæð út í dag, um teir frá fyrstan tíð høvdu hildið fast um at lagt fótbóltsvøllin uppi í Grønhólma, sum ætlað, í staðin fyri at leggja hann niðri á Dungasandi.

Tað er kanska einki at siga til, at sørvingar hava droymt um at spæla fótbólt uppi á meira turrum lendi, tí frá tí Sørvágs Ítróttarfelag varð stovnað í 1905 og til fótbóllsvøllurin varð liðugur næstan 50 ár seinni, spældu teir á sandinum, har fyrilit altíð mátti takast fyri flóð og fjøru.

Fótbólturin varð kortini ikki fluttur av tí váta sandinum og niðan í hagalendið uppi í Grønhólma. Á nevndarfundi í Sørvágs Ítróttarfelag 18. mars 1943 varð avgerð tikin um, at leikvøllurin skuldi liggja á Dungasandi. Kanska hava sørvingar verið harmir um at missa alt tað góða lendið uppi í Grønhólma.

Eina ábending um, hvussu tað hevði sæð út, um vøllurin ikki var komin at liggja á sandinum, men uppi í Grønhólma, fáa vit við at hyggja at teimum frálíku gomlu myndunum av Sørvági, sum eru avmyndaðar í bókini *Tíðarmyndir*, sum teir báðir Jákup á Stongunum og Ólavur í Beiti góvu út í 2003. Her sæst sandurin liggja heilt upp ímóti bygdini, beint niðan fyri húsini og endar mestsum í einum kýla, tí báðu megin við renna áirnar báðar Stórá og Kirkjuá. Tær báðar áirnar renna saman í eitt, beint áðrenn tær á flóð hvørva úti í sjóvarmálanum og renna út eftir sandinum á fjøru. Hetta var rein náttúra, sum ikki er longur.

Kirkjuáin gjørdi eitt natúrligt mark millum Oyruna, har sørvingar veltu epli í sandjørð og gamla Dungasand. Hetta var eitt sera vakurt umhvørvi tá, men undir krígnum broyttist so nógv. Eingilskmennirnir gjørdu brúgv yvir um Stórá, og teir asfalteraðu vegirnar og løgdu Nýggjaveg fra bygdini og allan vegin út á bakka og lagaðu ein vakran grótgarð móti sjónum. Hetta broytti alla fjøruna, og við fótbóltsvøllinum kom sandurin eisini at broytast. Náttúrumhvørvið varð umgjørt til eitt mannagjørt mentanarumhvørvi.

Arbeiðið upp á fótbóltsvøllin byrjaði so smátt í 1945, men hann kostaði, og tað tók sína tíð at fáa arbeiðið gjørt liðugt, hóast nógv varð gjørt fyri at fáa pening til vega. Tey spældu sjónleik og hvørt av sínum. Elias hjá Mykinesmanninum sigur í ritinum, at hann var við f*rá byrjan av fótbóltsvøllinum "Vit lagaðu móti Kongshylánni (Stórá). Grótið fingu vit av Stongum. Vit skutu við at leggja minukrút í rivur, og eg var við til at spreingja grótið, meðan aðrir vóru , ið lagaðu grótið framvið ánni. Hetta var í 1946".*

Ikki fyrr enn 19. apríl í 1954 var fótbólsvøllurin tikin í nýtslu við einum hátíðarhaldi. Vøllurin hevði sostatt 50 ára føðingardag seinasta ár. Síðani tá hevur fótbóltsvøllurin, leikvøllurin ella plenan verið ein partur av bygdarmyndini í Sørvági.



Mítt ættarlið varð borið í heim um sama mundið, sum byrjað varð upp á vøllin, og hann hoyrdi til okkara barnaland - eisini meðan hann stóð í gerð. Kanska onkur hómar okkurt av Dungasandi, men vøllurin hevur í mínum hugaheimi kámað øll minni um gamla sandin burtur.

Vøllurin er hjá mínum ættarliði vorðin ein partur av samleikanum hjá bygdini Sørvágur, og tað er nú ilt at hugsa sær, at hann skuldi kunna ligið aðrastaðni. Hann er vorðin ein miðstøð í bygdini, at meta við eitt torg, sum kann brúkast til so nógv annað eisini. Hann kemur væl við til øll tiltøkini á eini Vestanstevnu og annað, har nógv fólk koma saman. Nærhendis er nú eisini dansistova og hús til ítróttarendamál eru bygd á vøllinum sum nú eins og flestu fótbóltsvøllir í Føroyum hevur graslíki.

Hin vegin kann eg kortini ikki heilt sleppa tankanum um, hvussu tað hevði sæð út, um sandurin hevði ligið mestsum órørdur niðan móti húsinum. Men kanska er tað gott, sum tað er vorðið, tí um ikki, hevði vandi verði fyri onkrum verri. Sum er, liggur leikvøllurin har til gleði fyri ungdómin og er granni til Oyruna við Breiðagrasinum, sum er til enn við lívi av bæði fólki og vøkstri.

Nú Sørvágs Ítróttarfelag er vorðið 100 ár og fóltbóltsvøllurin gott og væl 50 ár, hava teir báðir Erhard Jacobsen og Esbern Joensen latið úr hondum eitt minnigarrit á føðingardegnum 17. mars 2005. Hetta er eitt stórt og prýðiligt rit, har roynt verður at lýsa søgu felagsins hesi 100 árini.

Teir sum stovnaðu felagið vóru Heini í Nýggjustovu, Ólavur í Ólavstovu, Løðu-Jógvan, Bíggjar-Hans og Jens-Ólav. Nøvn sum allir eldri sørvingar kennast við. Tað finnast ikki so nógvir upplýsingar um ta fyrstu tíðina. Men eitt er vist, at í mun til aðrar bygdir, hevur Sørvágur verið væl fyri, tá spælast skuldi fótbóltur, tí á fjøru er sandurin stórur, og hann var brúkiligur sum leikvøllur í mong ár, eisini tá Mikkjal á Ryggi yrkti sangin *Á leikvøllum funnust í forðum t*il Sørvágs Ítróttarfelag umleið 1912. Hetta er um ta tíðina, tá Føroya Fólks Songbók kom út á fyrsta sinni í 1913. Føroyingar vóru vaknaðir mentanarliga og tjóðskaparliga og høvdu ein inniligan tørv á at menna og kenna sín egna samleika. Sangur og leikur hava til allar tíðir hoyrt saman.

Hóast felagið í eina tíð næstan var dottið niður fyri og varð endurstovnað í 1937, so hevur tað eydnast at finna fram eitt og annað, sum kastar okkurt blunk á hesa tíðina. Teir hjálptust við tað teir høvdu. Tað var ikki tann stóri peningurin í fótbóltinum sum í dag. Ofta áttu teir bert tann eina bóltin. Men sørvingar vóru so hepnir at teir høvdu skómakara, sum bæði kundi væla um og seyma ein nýggjan bólt, um tað skuldi verða..

Tá sørvingar í 1935 spældu móti B36 í Sørvági spældu sørvingar í húðaskóm, meðan havnarmennirnir spældu í fótbóltsstivlum havnarmaðurin Jens Pauli av Reyni sigur at *"tað vísti seg at húðaskógvarnir vóru betur egnaðir. Havnarmenn stóðu fastir, men sørvingarnir vóru omaná og vunnu dystin 5-2- Tá flóðin kom inn, var neyðugt at hava bát liggjandi kláran at taka bóltin, tá hann fór á sjógvin…"* Elias hjá Mykinesmanninum sigur eisini í ritinum, at hann alla ta fyrstu tíðina spældi í húðaskóm og at *"Eingilsmennirnir flentu, tí eg leikti í húðaskóm. Eg leikti altíð har vesturi í húðaskóm, men tá ið vit vóru í Tórshavn, brúkti eg fótbóltsstivlar".*

Um teir so spældu í húðaskóm í Sørvági og meira professionelt í fótbólsstivlum, tá teir spældu í Havn, so dugdu sørvingar væl at spæla fótbólt. Meðan leikvøllurin enn stóð í gerð, og sørvingar enn ikki høvdu fingið rættiligan fótbóltsvøll, eydnaðist tað SÍ í 1947 at vinna á fyrsta og einasta sinni meistaradeildina í fótbólti og gjørdust føroyameistarar. Tað vóru serliga synirnir hjá Gretu-Sørin og Birt-Honnu, sum vóru tær stóru stjørnurnar í fótbóltinum tá, men tað vóru sjálvandi eisini aðrir góðir leikarar, sum tað so væl verður lýst í minningarritinum. Men tey bæði Gretu-Sørin og Birt-Hanna vóru bæði sera áhugað í fótbólti. Tey kundu fylgja við øllum úr stovuvindeyganum í húsum teirra. Men har vóru eisini fjepparar av báðum kynum í Sørvági, sum verða umrødd í bókini. Her er einki annað at gera, hjá tí sum vil hava meira at vita, enn at lesa tað sum í ritinum stendur.

Hóast undirtøkan á fundum í felagnum upp gjøgnum tíðina ikki altíð tykist at hava verið tann stóra, hava sørvingar havt fleiri eldsálir í nevndini í Sørvágs Ítróttarfelag, sum hava drivið á og skunda undir. Teir og tær eru nevnd í bókini. At tað enn eru eldsálir, er minningaritið eitt tað besta dømi um. Her er nógv hent í nýggjari tíð.

Málið hjá SÍ var har frá byrjan bæði ítróttarhøll og leikvøllur. Tað framgongur eisini, at formennirnir í felagnum hava hildið bæði leikarum og áhugaðum til við røðum og aðrari andstreystari uppseting. Fremst í huganum